# Brúka neyvan alt lánið

Norðurlond hava sagt seg vera til reiðar at læna Íslandi 2,5 milliardir dollarar í hjálp, men tað er als ikki vist, at íslendingar fara at brúka alt lánið. Íslendski fíggjarmálaráðharrin, Steingrímur J. Sigfússon, segði í gjár, at kanska fer stjórnin bara at brúka helmingin av láninum. Higartil hevur Ísland fingið ein fjórðing av láninum. Pengarnir vórðu útgoldnir í síðsta mánað, tá Altjóða Gjaldoyragrunnurin IMF hevði kannað íslendsku búskaparstøðuna. Steingrímur J. Sigfússon sigur við Morgunblaðið, at enn er ikki avgjørt, hvussu lánið frá Norðurlondum skal brúkast, ella hvussu nógv skal brúkast.



# Nú fáa kvinnurnar viagra

Kvinnur, sum líða av vantandu hugi til kynsliga samveru, kunnu nú byrja at gleða seg til at fáa hjálp frá Viagra-tablettum. Amerikanskir granskarar, sum hava gjørt royndir við heilivági ímóti tunglyndi, komu eftir, at evnið hevði onga ávirkan á fólk við tunglyndi, men at tað harafturímóti vakti kynshugin hjá kvinnum. Ritzau skrivar, at hetta minnir um tað, sum hendi, tá vísindin fann Viagra-tablettirnar til menn. Ta ferðina vóru tað royndir við hjartaheilivági, sum avdúkaðu, at heilivágurin hevði aðra ávirkan enn ta ætlaðu, men sum kortini er komin mongum manni væl við síðani.

Hanus Hansen:

# Angri at eg seldi Sundaberg

**Hanus Hansen, stjóri í JFK, hevur í dag boðað frá, at Skálaberg er seldur til Argentina. Nú eitt gott boð kom upp á Skálaberg, angrar hann at Sundaberg varð seldur fyrr í ár**

SKIPASØLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Fráboðanin kom í dag, at Skálaberg er seldur til Argentina fyri slakar 200 milliónir krónur, góðar 20 milliónir meira enn skipið kostaði at byggja fyri bara 6 árum síðani.

- Skipið er stórt og dýrt til tað fiskarí og framleiðslu, sum skipið ger. Tað er ein sannroynd, at minni og eldri skip hava eitt nógv størri avlop, enn tað er gjørligt at fáa við Skálaberg. Tí hevur reiðaríð í hyggju at útvega annað og meira hóskandi skip, sigur Hanus Hansen, stjóri í JFK.

Fyrr í ár varð verksmiðjutrolarin Sundaberg, sum var nakað eldri enn Skálaberg og sum bar seg betri, seldur. Og tað er nakað, Hanus Hansen er keddur av í dag.

- Jú, tað eri eg keddur av í dag. Men tað er nú einaferð so, at tá vit seldu Sundaberg, vistu vit ikki at vit kundu selja Skálaberg. Tað hevði dámt okkum betri, um tað var øvugt. Vit høvdu kunnað hugsað okkum at havt Sundaberg í dag og kanska sett hann í stand, segði Hanus Hansen við Rás2 fyrr í dag.

## Kvoturnar góvu mønustingin

Tað eru eftir øllum at døma nógv broyttu kvotuviðurskiftini, sum hava givið Skálabergi mønustingin.

- Ætlanin við skipinum var at framleiða meira umborð. Arbeitt varð við hesum fyrstu tíðina, men úrslitið var ikki gott nokk. Heilt einfalt, so eru sáttmálaviðurskiftini ikki liðilig nokk til at fáa forrætning í slíkt, sigur Hanus Hansen í tíðindaskrivi.

- Avgerandi fyri støðutakanina hevur eisini verið óvissan um kvotuviðurskiftini í Barentshavinum,nú svartkjaftúrin er minkaður so nógv, samstundis sum sera stór ósemja er um makrelin. Felagið metir tað ov váðið at vera so fíggjarliga bundin, um tilverugrundarlagið verður broytt munandi skeiva vegin, boðar stjórin í JFK frá.





*Nú tað hóast alt eydnaðist at selja Skálaberg, hevði tað dámt Hanusi Hansen betri, um Sundaberg enn var eftir í flotanum*

*Mynd: Eirikur í Jákupsstovu*

## Eingin uppsagdur

Hóast Skálaberg nú er seldur, er eingin av manningini uppsagdur.

-Tingast verður um keyp av øðrum skipi, og roknað verður við, at hetta er avgreitt innan stutta tíð. Eingin verður tí sagdur úr starvi, hevur Hanus Hansen boðað frá.

Sostatt hevur Hanus Hansen framvegis gott mót upp á at halda fram, og ætlanin er sum skjótast at fáa nýtt skip til vega.

# HUXA gongur egna leið

**Fólkaflokksungdómur, HUXA, hevur, sum fyrsta ungdómspolitiska felag, skipað sína egnu politisku stevnuskrá. Millum annað vilja tey strika upp- og afturlatingarlógina**

POLITIKKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Nevndin í HUXA er komin við egnari politiskari stevnuskrá.*

- Vit hava valt at gjørt okkara egnu stevnuskrá, fyri fólkið skal vita, hvat vit standa fyri, sigur Bjørk K. Olsen, forkvinna.

Politikkurin er skipaður í 10 bólkar: Arbeiðsmarknaðar-, vinnu-, tjóðskapar-, heilsu-, almanna-, uttanríkis-, rættar-, umhvørvis- og útbúgvingarpolitikkur.

Politikkurin verður almannakunngjørdur í bitum fram til 5. januar 2010, og sigur millum annað:

Tað er okkara hugsan, at vælferðin í samfelagnum verður skapað av privata vinnulívinum. Tí er tað sera týdningarmikið, at natúrlig amboð verða nýtt at skapa umstøðurnar hjá føroysku fyritøkunum, sigur HUXA.

- Fyri tað fyrsta, skulu fyritøkuskattir lækkast/avtakast, soleiðis at kappingarførið kann betrast. Samstundis skal allur stuðul til vinnulívið avtakast. Stuðul skapar ójavnvág á marknaðinum og gevur pørtum av honum kunstigt lív. Landið skal ikki hava nakra ávirkan á, hvørjar fyritøkur skulu virka á føroyska marknaðinum.

- Tað er okkara hugsan, at sjálvræðismentanin og íverksetaraandin er tað grundleggjandi fyri føroyska búskapin. Tað skal gerast eggjandi, og góðir karmar skulu skapast hjá íverksetarum, bæði føroyskum og útlendskum, at seta egna fyritøku á stovn í Føroyum.

- Tí mælir HUXA til, at, partafelagsskatturin skal lækkast/avtakast, eingin stuðul skal gevast privata vinnulívinum, íverksetara- og sjálvræðismentanin skal styrkjast og at alt alment vinnuvirksemi skal einskiljast.

Hartil sigur HUXA eisini, at upp- og afturlatingarlógin gongur ímóti allari sunnari fornuft og skal strikast.

KOYRIKORT
TIL TAXA
Um nóg nógv tekna seg, verður vikuskiftisskeið til taxakoyrikort 20. - 21. nov. Tilmelding á tlf. 214381
HJÁ MARNAR ANDREASEN
TEL. 314381 FARTEL. 214381